Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

8. oktober 2020

UMMÆLISSKRIV

viðvíkjandi

uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)
(Leinging av rættinum til barsilspening, hækkan av barsilsgjaldinum og broyting viðvíkjandi kærunevndini)

Leingjan av rættinum til barsilspening

Fyrst er at siga, at BLF gleðist um, at samgongan leggur upp til at leingja rættin til barsilspening eftir barnsburð við 4 vikum, úr 48 vikum upp í 52 vikur.

Nú barnsburðarfarloyvið við barsilspeningi verður longt upp í eitt ár, metir BLF at tíðin er búgvin at umhugsa tillagingar í skipanini, sum kunnu vera við til at eggja pápum at taka part av farloyvistíðini.

BLF vil her loyva sær at endurgeva úr viðmerkingunum til lógaruppskotið, sum á síðu 8 skriva:

”Hagtøl úr Føroyum og hinum Norðurlondunum vísa, at pápar fara í barsilsfarloyvi so leingi, sum barsilsfarloyvið við lóg er markað til teir. Avleiðingin av lógaruppskotinum kann tí væntast at verða, at mammur fara at vera í barsilsfarloyvi í 48 vikur í mun til 44 vikur, sum nú.”

Mammur í Føroyum taka nógv tann størsta partin av barnsburðarfarloyvinum við 92%, um hugt verður at tølum frá 2017. So hóast foreldur í dag kunnu býta 30 vikur millum sín, so eru tað mammurnar, sum taka meginpartin av barnsburðarfarloyvinum. Samanborið við páparnar í grannalondunum eru føroysku páparnir teir, ið taka minst lut í rættinum til

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

barnsburðarfarloyvi. Í Danmark taka páparnir 10% av farloyvinum, í Finnlandi 11%, í Noregi 21%, í Svøríki 27% og í Íslandi 30%. Føroysku páparnir taka 8% av barnsburðarfarloyvinum.[1]

Verða eingi tiltøk sett í verk fyri at tryggja, at pápar taka ein størri part av barnsburðarfarloyvinum, fer hetta uppskotið at elva til, at kvinnur vera uppaftur longur burtur frá arbeiðsmarknaðinum í sambandi við barnsburð.

Henda fráveran frá arbeiðsmarknaðinum hevur m.a. ávirkan á lønarinntøku, eftirlønarsamansparing og onnur ognarviðurskifti hjá kvinnum í Føroyum.

BLF mælir tí staðiliga til, at tær fýra vikurnar, sum landsstýrið við hesum uppskoti ætlar at leggja aftrat barnsburðarfarloyvinum, verða markaðar til pápan.

Smidligari skipan

Nógv hevur verið tosað um at gera barsilsskipanina smidligari. Á síðu 13 í samgonguskjalinum stendur soleiðis:

”Barnburðarfarloyvið verður longt til minst 52 vikur, og skipanin verður gjørd smidligari. Hetta skal til dømis geva foreldrum møguleika at arbeiða niðursetta tíð og møguleika at ráða fríari yvir farloyvistíðini.”[2]

Hetta skrivaðu samgonguumboðini í vinnunevndini eisini tann 27. mai 2020 í áliti til løgtingsmál nr. 121/2019.

Í fyriliggjandi uppskoti sæst tó ikki at vera ætlan um at gera skipanina smidligari, og leggur BLF dent á, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir við, um slíkar broytingar verða gjørdar.

[1] Norðurlendska Ráðharraráðið, Nordisk Statistik 2017. Sí eisini *Ymiskar fortreyti: Ein lýsing av vantandi javnstøðuni í Føroyum*, Javnaðarflokkurin á Fólkatingi.

[2] https://www.foroyalandsstyri.fo/fo/landsstyrid/samgonguskjalid/

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

Inngjaldið hækkar

Løntakarar skulu sambært uppskotinum rinda meira í barsilsgjaldi. Barsilsgjaldið, ið skal rindast av øllum móttiknum A-inntøkum, verður hækkað úr 0,71% upp í 0,86% frá og við 2021.

BLF harmast um, at tað verður mett neyðugt at hækka inngjaldið hjá løntakarum fyri at fíggja broytingarnar í uppskotinum.

Hoyring
At enda verður víst á, at tað er óheppið, at uppskotið ikki er sent fakfeløgunum til viðmerkingar.

Landsstýrismaðurin mælir við uppskotinum til týðandi broytingar í barsilsskipanini, sum hava stóra ávirkan á arbeiðsmarknaðin og løntakaran. Slíkar broytingar eiga at verða viðgjørdar saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Vinarliga

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya